## DAGSINS MEINING

# Neyðhjálp og menningarhjálp

Hóast tað bæði verður sagt, at jólini eru til páskar, og at gomlu føroysku jólini vóru til á trettandu, so sleppa vit ikki undan, at í nýmótans samfelagnum eru jólini løgd afturum. Nýggjárið stendur fyri framman, og so er dagliga trummurummið aftur á skránni. Tað hevur ljóðað frá, at jólini hava verið friðarlig. At tað ikki hevur verið soleiðis alla staðni, hevur verið sjón fyri søgn í miðlunum. Katatrofan í Bengalska flógvanum er so mikið stór og álvarslig, at tað ber ikki til at siga frá tí. Og ivaleyst er katastrofan komin okkara parti av heiminum uppaftur nærri, nú tað vísti seg, at fleiri norðurlendingar teljast millum teirra, sum hava latið lív.

Ofta hevur verið klikt niður á almennu Føroyar, at tær eru so seinar á sjóvarfallinum og ikki lata við seg koma, tá ið tað hevði havt verið upp á sítt pláss við ítøkiligari hjálp at víst samkenslu. Hesa ferð vóru løgmaður og landsstýrið tíðliga úti. Tað tænir teimum til miklan sóma. Ein millión er ikki øll verðin, sigur onkur kanska. Tað er satt, men tað setir føroyska viljan ikki so lítið í perspektiv, tá ið vit leggja afturat, at Danmark hevur gjørt av at veita tíggju milliónir. Tað hevði verið stór hjálp, um lutfalsliga hjálpin úr øðrum londum, sum eru væl fyri, hevði verið lutfalsliga eins stór, sum hon er hjá Danmark og serliga hjá Føroyum. Tá ið politiski myndugleikin nú hevur tikið stig til neyðhjálpina, sum í hesum førinum er alneyðug, leiðir tað hugsaninar aftur á, hvussu tað stendur til við almenna politikkinum, tá ið tað ræður um menningarhjálp.

Menningarhjálp og katastrofuhjálp eru hvør sítt, og tað eigur ongantíð at verða soleiðis, at katastrofuhjálp verður fíggjað við, at tað verður skarvað av menningarhjálpini. Menningarhjálp er miðvís hjálp, sum í føstum karmum verður veitt londum, sum eru illa fyri. Hvat og hvussu og fyri hvussu nógv menningarhjálpin skal fevna um, eigur tað helst at vera breið semja um, áðrenn tað verður gjørt av, hvussu nógv skal setast av á fíggjarlógini. Tá ið samgonguskjalið varð orðað eftir løgtingsvalið fyri skjótt einum ári síðani, varð undirstrikað, at nú skuldu almennu Føroyar orða ein menningarpolitikk. Ein partur av hesum politikkinum skuldi verða, at málið hjá almennu Føroyum skuldi verða, at brotparturin av fíggjarlóginum, sum skal veitast í menningarhjálp, skal kvinkast tann vegin, at hann støðugt verður nærri tí brotpartinum, sum ST heldur, at øll heimsins lond eiga at veita í menningarhjálp.

Innihaldsligi parturin av menningarhjálpini eigur inat verða umrøddur gjølla. Hóast tað er ein veruleiki, at Føroyar hava verið eftirbátur her, merkit tað ikki, at føroyingar ikki hava verið og eru áhugaðir í at hjálpa í fátøku pørtunum av heiminum. Tað kemur til sjóndar á so ymiskan hátt. Neyðhjálp Fólkakirkjunar, Reyði Krossur og trúboðaraarbeiði, sum føroyingar gera og eru partar av í Eystureuropa, í Afrika, Asia og Latínamerika og hjálpararbeiði í uppaftur øðrum líki og tæna okkara fólki til stóran heiður og sóma, og tað er ein nærliggjandi spurningur, um tey feløg og teir stovnar og tær kirkjur og samkomur, sum brúka nógva tíð, orku og pengar upp á hetta, og sum hjálpararbeiði heilt víst er ein hjartasøk hjá, ikki eiga at verða hoyrd, tá menningarpolitikkurin verður viðgjørdur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Klaksvíkar Sjúkrahús – eitt attraktivt stað fyri serlæknar

**Elsebeth Gunnleygsdóttur Hansen**



Í samband við kommunuvalið 2004 valdi eg at taka evnið upp um Klaksvíkar Sjúkrahús,nú sambandið til fastlandið verður veruleiki. Eg fór undir at kanna um støðuna hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og hvørja ávirkan tað hevur fyri onnur.

Tað kom fram undir kanningini, at Klaksvíkar Sjúkrahús er eitt sera attraktivt stað fyri serlæknar í ymiskum greinum, bæði innan fyri bleytkiurgi og beinkiurgi. Hettar kemst av, at starvfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er sera dugnaligt og hevur stórar royndir at skifta ímillum ymiskar sergreinar og er opið fyri at nema sær nýggja vitan. Tey eru somuleiðis von við at arbeiða undir ymiskum læknum, og ger hetta, at serlæknarnir eru glaðir fyri at arbeiða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Hesin háttur, sum verður brúktur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, at serlæknar koma hendavegin, verður eisini brúktur fleiri aðrastaðni, so sum Norður Norra og Norður Svøríki. Á einum lítlum sjúkrahúsi er tað gjørligt at skipa arbeiðið meiri effektivt. Møguleiki er fyri at gera eitt kanningarumfar í einari skiftu, so sjúklingur sleppur frá at ferðast fleiri ferðir.

Tað kann eisini viðmerkjast, at Klaksvíkar Sjúkrahús hevur veruliga havt eydnuna við sær í samband við »laminar air flow systemið«, har bakteriutalið er serliga lágt. Hetta viðførir so aftur, at minni vandi er fyri infektión eftir skurðviðgerð.

Av tí at eg síggi tað sum týdningarmikið, at vit í Føroyum vita um hettar, seti eg hesar reglur í blaðið.

# Vit mugu broyta hugburð viðíkjandi KODA peningi

**Gissur Patursson**
*Framleiðslu & Grammex-grunnurin*



Peningurin verður jú í stóran mun afturborðin á klettarnar…

Vit mugu hava ein tónleikahugburð og ikki verða so »hatafull« mótvegis tónleikinum og tí ið hoyrur honum til… sjálvandi skulu vit gjalda KODA!!!

Tað er mær ovboði enn einaferð at frætta, at vinnulívið IKKI heldur seg skula gjalda fyri at hugna um kundar sínar við tónleiki av eini rás ella av einum fløguspælara. Tað verði seg á toll/lækna/hárfríðkanarhølum ella svimjihøll. Orsøkin fyri at vit spæla tónleik er sera einføld: Tað er fyri at vera meiri viðkomandi og at hava tað meiri »hugnaligt« í hesum ávísu umráðum. Men her eru vit nakað fyri okkum sjálvi her á klettunum. Sum eitt tað einasta norðanlandið so sær tað út fyri mær, at vit ikki virða okkara og aðrar tónleikarar & tónasmiðir. Ein og hvør, ið nýtir tónleik, eigur at gjalda fyri at avspæla slíkan í ávísum hølum sambært lóggávu um hetta endamál t.d. KODA. Skal ikki hesa ferð fara í dýpdina við hesum, men minna á, at hetta er stór hjálp til sjálvhjálp, tí peningurin kemur aftur til Føroyar tónleikavinnuni at frama, og er sostatt hjálp til sjálvhjálp. Og, vænti eg, at um fá ár er hetta ikki so lítið, ið vit soleiðis fáa aftur – ella eiga at fáa aftur, um loftmiðlar okkara bera seg rætt at.

Um tú letur ein handil/bilstøð/vinnuhølir upp í t.d. Íslandi el. Svøríki/ Danmark, ja so er ein av útreiðslunum, sum ein roknar við umframt trygging/ el/ reingerð o.a. sjálvandi KODA avgjald. Tað er ein 100% sjálvfylgja, og í hesum londum gjalda brúkararnir sjálvandi eisini útvarpsgjald. Og skal eg enn einaferð harmast um væntandi upplýsing og hugburð á hesum økinum og heita á øll støð um at nýta tónleik í rætta høpinum okkum øllum at frama. Ikki minst tónleikarunum/tónleikasmiðum.

Við tónlista-kvøðu og ynski um eitt gott nýttár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.